# Tyngri enn í kreppuárunum

**Støðan er verri, enn fleiri geva sær far um, siga fólk í flakavinnuni. Stjórin á Føroya Fiskavirking sigur, at tað er tyngri at selja fisk í dag, enn tað var undir kreppuni**

VINNAN
*Edvard Joensen*



*Tað er tyngri at selja fisk í dag, enn tað var undir kreppuni, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking*

Tað stendur munandi verri til, enn nógv fólk geva sær far um. Fiskaprísirnir eru lágir. Alivinnan er í beinleiðis kreppu, og fólk royna sum frægast at tryggja seg, har tey vænta støðugt arbeiði.

Petur Mohr, sum er virkisleiðari á flakavirkinum Norðís á Eiði, heldur beinleiðis, at tað eru nógv fólk í samfelagnum, sum veruliga ikki vita, hvussu vánalig støðan er í fiskivinnuni.

– Tey merkja einki til tað persónliga, og hava tí onga føling við veruligu støðuni. Og tað er vandamikið, sigur hann.

## Einstáttað

Meinhard Jacobsen, stjóri á Førya Fiskavirking hevur nøkunlunda somu uppfatan. Hann endurgevur ein av sínum gomlu professarum fyri at siga, at tað er ógvuliga týdingarmikið at rokna, men enn týdningarmiklari at kanna eftir, at tað, ein hevur roknað, er rætt.

– Vit eru soleiðis fyri, at okkara vinna tolir bara ein møguleika, sigur Meinhard Jacobsen. Tí skal roknistykkið vera rætt fyrstu ferð. Kiksar marknaðurin einaferð, eru aðrir farnir við honum, áðrenn vit koma aftur, og vit hava bara tað sama at koma aftur við. Tað er okkara veikleiki, staðfestir hann.

Petur Mohr, virkisleiðsri á Norðís, heldur, at veruliga støðan hjá fiskivinnuni er ov illa lýst. Hann heldur stutt og greitt, at tað er tí, at nógv fólk, sum úttala seg, vita ov lítið um, hvussu veruliga stendur til.

– Støðan er nógv hættisligari, enn dagliga verður givið fatan av, sigur hann. Fiskavirkinin á landi hava tað ikki gott. Fleiri høvdu undirskot í fjør. Og fleiri av skipunum flóta eisini tungt í sjónum.

– Línuskipini eru ikki ringast fyri, sigur hann. Men bæði útróðrarflotin og trolararnir hava tað tungt.

Upsin hevur lágan prís. Trolaramenn tosa um, at teir fiska til hundafóður. Og hýsan er rættiliga illa fyri. Hon er so rak, at ikki fæst líkinda úrtøka úr henni, sigur virkisleiðarin á Norðís.

Hartil kemur so, at nógvar goymslur kring landið eru í fyllra lagi. Illa gongst at sleppa av við fisk fyri ein prís, sum til ber at liva av. Og har eru vit so fangað, sigur Petur Mohr.

## Hørð kapping

Vit eru í álvarsligari kapping, sum vit í løtuni hava ilt við at vinna, siga virkisleiðarin á Norðís og stjórin á Føroya Fiskavirking. Kappingarførið er verri, enn vit halda.

Petur Mohr vísir á, at vit á saltfiskamarknaðinum kappast við eitt nú íslendingar, sum keypa tosk fyri helvtarprís av tí, føroysku virkini lata. Tað sæst sjálvandi aftur í hinum endanum, tí har er prísurin tann sami fyri føroyskan og annan fisk. Úrslitið verður sjálvandi, at føroyska virkið hevur minni eftir enn kappingarneytin.

Vit hava eisini kapping á øðrum økjum, sigur Meinhard Jaocbsen. Evran er sterk, og tað merkist týðuliga, tá vit skulu selja til europeiska marknaðin, sum er okkara høvuðsmarknaður. Evran er eisini styrknað nógv í mun til norsku krónuna, og tí fáa tær stóru norsku nøgdirnar, sum koma á marknaðin, sjálvandi eisni fyrimun av.

Umframt kemur so, at veiki dollarin ger, at fiskasløgini, sum serliga kappast við upsan so sum Alaska Pollock og Hake, eisini verða bílig.

– Sannleikin er tann, sigur Meinhard Jacobsen, at tað er tyngri at selja fisk í dag, enn tað var undir kreppuni í nítiárunum.

## Fólk flyta

Fólk flytir í vinnuni. Fleiri og fleiri eru um boðið, tá størv verða lýst leys. Sosialurin hevur tosað við virki, sum hava havt lýsingar eftir fólki. Tey siga frá rættiliga stórum áhuga fyri teimum størvum sum lýst eru leys. Bæði fyritøkur í bygivinnuni og eisini fiskavirki.

Talan er um fólk, sum søkja bæði úr traditionellu fiskivinnuni og serliga úr alivinnuni.

– Og her tosa vit bæði um fólk, sum longu eru uppsøgd, og fólk, sum fara í góðari tíð, tí tey síggja eina uppsøgn fyri framman, sigur ein virkisstjóri, Sosialurin hevur tosað við, men sum tó ikki við verða nevndur í blaðnum.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur at tað er skilligt, at nú rørist í pottinum, og fólk eru farin at órógvast og fara at leita sær eftir arbeiði aðrastaðni enn í teimum hóttu vinnunum. Serliga eru tað fólk í alivinnuni, sum flyta, staðfestir hann og vónar inniliga at hendan støðan ikki verður drúgv.

– Nøgdin av tøkari arbeiðsmegi økist, sigur hann. Og eg vænti, at fleiri av hesum noyðast av landinum at finna sær arbeiði. Hjá okkum fer eisini at minka, tí vit fara eisini at rationalisera, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking.



*Veruliga støðan hjá fiskivinnuni er ov illa lýst, sigur Petur Mohr, virkisleiðari á Norðís, sum heldur, at tað eru ov nógv fólk í Føroyum, sum ikki hava føling við tí, sum veruliga hendir í samfelagnum*






# Trygdarbeltið bjargaði mær

**19 ára gamla Jóhanna í Króki av Strondum var í einum álvarsligum ferðsluóhappi í oktober í fjør. Bilurin, sum hon koyrdi, fór sera illa og hon fekk at vita frá løgregluni, at um hon ikki sat í trygdarbeltinum, so var hon deyð á staðnum**



*– Trygdarbeltið bjargaði mær, tá eg kom út fyri einum ferðsluóhappi á Skála í oktober í fjør. Eg fekk at vita frá løgregluni, at um ikki eg sat í beltinum, var eg deyð á staðnum, sigur 19 ára gamla Jóhanna í Króki av Strondum*

*Mynd: Jens K. Vang*

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Strendur:**
Uppi á Fløtum standa eini stór svørt og hvít hús. Inni í húsinum býr 19 ára gamla Jóhanna í Króki saman við einari av sínum fýra systrum og foreldrunum.

Jóhanna er ein prátingarsom ung kvinna, sum av álvara hevur lært at virðismeta lívið. Hon kom út fyri einum ferðsluóhappi við bilinum hjá foreldrunum tann 26. oktober í fjør. Óhappið hendi á Skála heilt tíðliga um morgunin. Jóhanna minnist ikki reiðiliga, hvat hendi, tí hon misti vitið eina løtu. Bilurin varð vrak, og frá løgregluni fekk hon at vita, at hon hevði verið sera heppin.

Hóast hon fekk ein stóran skelk, so koyrir hon aftur bil í dag, men sigur sjálv, at hon ikki er heilt trygg við tað.

Hon hevur valt at traðka fram við sínari søgu, tí hon heldur so avgjørt, at hon hevur ein boðskap at senda út um, at ein eigur at sita í trygdarbeltið.

– Eg kundi tað sama verið deyð, men trygdarbeltið bjargaði mær, sigur hon álvarsom.

## Óhappið

Jóhanna var á veg út aftur á Strendur tíðliga sunnumorgunin tann 26. oktober 2003. Hon veit ikki, júst hvat hendi.

Hon minnist bara, at hon koyrdi á Skála, at so brádliga var bilurin farin út av vegnum og koyrdi í grøvini við síðuna av vegnum.

So rendi bilurin á ein steingarð, sum er laðaður framvið og steðgaði.

– Eg minnist bara, at eg skríggjaði ræðuliga hart ,og tað ljóðaði ikki sum eg. So fekk glassplintur í munnin og so var alt kvirt, greiðir unga strandakvinnan frá.

Hon slapp tó við egnari hjálp úr bilinum og gekk ør á vegnum og mól. Ein bilur kom á staðið og koyrdi hana heim.

Ikki fyrr enn seinni gekk tað upp fyri Jóhonnu, hvat var hent. Hon var púra í ørviti og enn tann dag í dag, sigur hon, at hon minnist ikki túrin frá Skálabotni til óhappið hendi.

Hon fekk ikki stórvegis skaða av óhappinum, men gongur enn til viðgerð fyri koyrilsbrest. Pínu hevur hon onga longur, men tað órógvar hana so mikið nógv, at hon hevur verið sjúkrameldað síðani óhappið og hevur ikki fingið spælt hondbólt.

Men tað er hon við at taka uppaftur nú. Hon er so smátt farin aftur til arbeiðis og spælir hondbólt av og á.

## Tók bilin

Jóhanna fylti 19 ár tann dagin óhappið hendi. Hon skuldi koyra ein vin til Havnar. Foreldrini áttu ein Rover 600, sum var rættuliga nýggjur. Hon helt, at eftirsum, at hon hevði føðingardag, so slapp hon at lána bilin. So hon spurdi ikki foreldrini áðrenn, men fór bara avstað við bilinum. Hetta hevur givið henni sera ringa samvitsku síðani óhappið.

– Mamma og tey hava ongan bil í dag, tí eg krasjaði hann. Og eg vildi ynskt, at eg kundi keypt teimum ein nýggjan, sigur hon stillisliga.

Frá Bileftirlitinum hevur hon fingið at vita, at antin misti hon tamarhaldið á bilinum og rendi útav ella punkteraði bilurin. Men tað er ikki staðfest, hvør av hasum møguleikinum, veruliga var orsøkin til óhappið.

Jóhanna er sannførd um, at tað hevði lætt munandi um ringu samvitsku hennara, um foreldrini høvdu keypt ein nýggjan bil.

– Tey hava tosað um tað, og eg vóni, at tað verður skjótt, tí eg kann ikki lata vera við at hugsa um, at tey ongan bil hava orsakað av mær, sigur hon.

## Koyri ikki aftur

Beint eftir óhappið ætlaði Jóhanna, sum tá hevði havt koyrikort í eitt ár, at bróta koyrikortið, tí hon ætlaði sær ikki at seta seg handan eitt ratt aftur. Men foreldrini eggjaðu henni til at fara at koyra aftur beinanvegin, tí eitt óhapp kann henda fyri ein og hvønn.

So við og við fór hon at koyra aftur, men hon sigur, at tað er ringt at koyra, tá foreldrini eru við í bilinum.

– Tá tey eru við, tori eg stak illa at koyra, tí eg eri bangin fyri, at okkurt skal henda, meðan tey eru við, greiðir Jóhanna frá.

Hon harmast eisini um, at fólk ikki longur hava álit á henni sum bilførara. Ongin hevur beinleiðis sagt tað við hana, men hon sigur, at hon merkir tað á fólki, at tey vilja illa koma við henni í bili.

Tað er nakað, sum særir hana, tí hon heldur ikki, at hon er ein verri bilførari fyri tað, um hon kom út fyri einum óhappi.

Men samstundis ásannar hon kortini, at tað er torført fyri hana at koyra bil til tíðir.

– Serliga tá eg koyri fram við staðnum, har óhappið hendi, tá kann eg gott blíva illa fyri av minnunum, tí óhappið er enn so feskt í mínum minni, sigur hon.

## Marruna

Tá Jóhanna var komin heim í øllum góðum eftir óhappið og alt var so nøkulunda komið upp á pláss, legði hon seg. Hon svav ikki minni enn 13 tímar, men tað hevur helst verið av góðum grundum.

Men svøvngávurnar hildu ikki fram at vera líka góðar. Hon byrjaði at droyma og at fáa marruna um, at hon var aftur í bilinum og um óhappið sjálvt.

Og tað gjørdi tað so ikki betur, at hon fyri einum mánaði síðani ella so aftur var stødd í einum bili, sum kom út fyri einum óhappi. Hesuferð koyrdi Jóhanna ikki sjálv, men ein vinmaður.

Tey vóru á veg suður til Havnar at hyggja eftir steypafinaluni í hondbólti. Koyrilíkindini hendan dagin vóru út av lagi vánalig, og tá tey komu til Kollafjarðar, hendi alt so skjótt. Jóhanna greiðir frá, at tað var krapi á vegnum, og bilurin fór uppfrá, gronin rendi í bilverjuna, so fór bilurin runt og tá tók reyvin í bilverjuna, og tá hann so aftur stóð stillur stóð hann í sama bana aftur og vendi sama veg.

– Vit kundu tað sama koyrt víðari, um ikki bilurin var so illa farin, sigur Jóhanna.

Fimm fólk vóru í bilinum. Øll sótu í trygdarbelti, og ongin teirra fekk nakran skaða.

Tey hildu leiðina fram í øðrum bili til Havnar, hóast óhappið skelkaði tey øll.

Jóhanna sigur sjálv, at hon upplivdi hetta óhappið sum nakað sera óhugnaligt, tí hon so stutt framman undan hevði verið úti fyri hinum. Men hon helt saman við hinum fýra leiðina fram til Havnar kortini.

## Onki misálit

Tá dysturin í Havn var av, fóru tey inn aftur til Strendur. Jóhanna sigur, at eftir óhappið boðaðu tey sjálvandi frá heima, hvat var hent, men at øll høvdu tað gott og fóru til Havnar. Mamma Jóhonnu var sera ørkymlað og ringdi ofta til Jóhonnu á vegnum innaftur. Men tað skilir hon væl.

Hon valdi tó sjálv at fara aftur í bilin við sama førara, tí hon veit, hvussu tað er, tá ein hevur verið úti fyri óhappi.

– Tað kann henda fyri ein og hvønn. Og eg helt, at eg skuldi geva honum ein kjans afturat. Tað gekk fínt at koyra inn aftur til Strendur, sigur Jóhanna í Króki, sum hevur valt at trína fram við sínari søgu av fleiri orsøkum.

– Tað er gott fyri meg at kunna práta um óhappið. Tað reinsar meg, og eg haldi, at tað er nakað stórt, at eg eri á lívi, tá eg líka so væl kundi havt latið lív í hasum óhappinum. Trygdarbeltið bjargaði mær, og tann boðskapin vil eg fegin vera við til at senda út. So havi eg í øllum førum gjørt mítt á hesum økinum, sigur Jóhanna í Króki, sum eisini hevur verið í samband við Ráðið fyri Ferðlsutrygd um hetta.



*Bilurin, sum Jóhanna koyrdi, ein Rover 600 fór sera illa í óhappinum og bleiv vrak. Bert tann handari parturin av bilinum var heilur. Á myndini sást eisini, at tað var sera heppið, at ongin sat við síðuna av framman*

*Privatmynd*